Kunngerðablaðið A
2021
Givið út 23. juli 2021

Nr. 118 20. juli 2021

**Kunngerð**
**um**
**vernd av ungfiski og hámark fyri íblanding av ungfiski**

Við heimild í § 25, stk. 4, § 34, stk. 1, nr. 2 og § 64, stk. 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020 og løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Kunngerðin er galdandi fyri fiskiskap í føroyskum sjógvi og ásetir reglur fyri at verja ungfisk.

*Heitið ungfiskur og loyvt hámark fyri íblanding av ungfiski*

**§ 2.** Í hesi kunngerð er fiskur, ið er minni enn niðanfyri nevndu mát, mátaður fremst úr høvdinum til aftast á stertinum, ungfiskur:
1) Upsi, Pollachius virens, 55 cm.
2) Toskur, Gadus morhua, 50 cm.
3) Hýsa, Melanogrammus aeglefinus, 45 cm.
4) Stórur kongafiskur, Sebastes norvegicus, 37 cm.
5) Trantkongafiskur, Sebastes mentella, 37 cm.
6) Blálonga, Molva dypterygia, 75 cm.
7) Longa, Molva molva, 75 cm.
8) Brosma, Brosme brosme, 50 cm.
9) Havtaska, Lophius piscatorius, 55 cm.
10) Gulllaksur, Argentina silus, 28 cm.
11) Svartkjaftur, Micromesistius poutassou, 23 cm.
12) Sild, Clupea harengus, 25 cm.
13) Makrelur, Scomber scombrus, 30 cm.

*Stk. 2.* Hámark fyri íblanding av ungfiski:
1) Av upsa, í hvørjum háli ella fyri snellu hvønn dag, skal ikki meira enn 30% í tali vera ungfiskur.
2) Av toski, í hvørjum háli ella hvørjari setu, skal ikki meira enn 30% í tali vera ungfiskur. Fyri fiskifør, ið royna við snøri ella snellu og fiskifør undir 110 tons, ið royna við línu, er hámarkið 30% í tali hvønn dag.
3) Av hýsu, í hvørjum háli ella hvørjari setu, skal ikki meira enn 30% í tali vera ungfiskur. Fyri fiskifør, ið royna við snøri ella snellu og fiskifør undir 110 tons, ið royna við línu, snøri ella snellu, er hámarkið 30% í tali hvønn dag.
4) Av kongafiski, í hvørjum háli ella hvørjari setu, skal ikki meira enn 25% í tali vera ungfiskur. Hámarkið er galdandi fyri øll fiskifør, ið royna við troli ella línu.
5) Av blálongu, í hvørjum háli ella hvørjari setu, skal ikki meira enn 25% í tali vera ungfiskur.
6) Av longu, í hvørjum háli ella hvørjari setu, skal ikki meira enn 25% í tali vera ungfiskur.
7) Av brosmu, í hvørjum háli ella hvørjari setu, skal ikki meira enn 25% í tali vera ungfiskur.
8) Av havtasku, í hvørjum háli ella hvørjari setu, skal ikki meira enn 25% í tali vera ungfiskur.
9) Av gulllaksi, í hvørjum háli, skal ikki meira enn 10% í tali vera ungfiskur.
10) Av svartkjafti, í hvørjum háli, skal ikki meira enn 50% í tali vera ungfiskur.
11) Av sild, í hvørjum háli, kasti ella setu, skal ikki meira enn 10% í tali vera ungfiskur.
12) Av makreli, í hvørjum háli ella kasti, skal ikki meira enn 10% í tali vera ungfiskur.

*Fráboðanarskylda og skylda at flyta øki*

**§ 3.** Er íblandingin av ungfiski, sambært § 2, stk. 1, størri enn tað hámark, ið ásett er sambært § 2, stk. 2, skal skiparin beinanvegin boða Vørn frá umvegis fráboðanarskipanina á heimasíðuni www.vorn.fo. Um íblandingin av ungfiski av ávikavist svartkjafti, sild og makreli er størri enn tað hámark, ið ásett er sambært § 2, stk. 2, skal skiparin beinanvegin boða Vørn frá umvegis fráboðanarskipanina á heimasíðuni www.vorn.fo, og skal fiskifarið alt fyri eitt gevast at fiska í økinum og flyta í minsta lagi 10 fjórðingar frá eini og hvørjari knattstøðu á tóvinum næstu 72 tímarnar.

*Stk. 2.* Skiparin hevur skyldu at upplýsa íblandingina av ungfiski.

*Bráðfeingis veiðibann*

**§ 4.** Tá Vørn fær fráboðan, sum nevnt í § 3, ella á annan hátt varnast, at ov stórur partur av veiðuni er ungfiskur, ger Vørn av, sambært § 59, stk. 1 í løgtingslógini, hvørt bráðfeingis veiðibann skal ásetast fyri leiðina. Leiðin, ið stongd verður, skal ikki vera størri enn mett verður neyðugt til tess at sleppa undan ov stórari íblanding av ungfiski.

*Stk. 2.* Bráðfeingis veiðibann kann lýsast upp til 4 vikur hvørja ferð.

*Revsing*

**§ 5.** Brot á § 3 verða revsað við sekt.

*Stk. 2.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

*Stk. 3.* Sambært § 70 í løgtingslógini kann Vørn beinanvegin taka aftur rættin til at reka vinnuligan fiskiskap, um brot er framt sambært stk. 1. Rætturin at reka vinnuligan fiskiskap kann takast aftur upp til 4 vikur hvørja ferð.

*Gildiskoma og úrgildisseting*

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. september 2021, og samstundis fara úr gildi kunngerð nr. 55 frá 26. mars 1993 um heiti ungfiskur av ávísum fiskasløgum og hámark fyri blanding av ungfiski og kunngerð nr. 56 frá 26. mars 1993 um serlig tiltøk til vernd av ungfiski.

Fiskimálaráðið, 20. juli 2021

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)